

## Føroyingar ongan áhuga í altjóða hjálpararbeiði

Reyði Krossur Føroya hevur haft í longri tíð havt lýsingar um altjóða hjálpararbeiði uttan at føroyingar hava víst hesum áhuga. Hetta harmar Reyða Kross, sum nú ger enn eina roynd at røkka føroyingum. Starvið, ið talan er um, er at fara 2 mánaðir út i eitt menningararbeiði, sum Reyði Krossur i Kambodja og Føroyum hava gjørt avtalu um. Men illa hevur gingið í hond at fáa føroyingar at søkja. Tí er avtalað, at umsóknarfreistin er útsett til 18. Juni 2009. - Uppgávan verður latin persóni við viðkomandi útbúgving og starvsroyndum, eftir at viðkomandi hevur fingið kunning um, hvussu Reyði Krossur arbeiðir uttanlands og gevur hetta eina vitan og síðan ein førleika, at viðkomandi kann gerast "Reyða Kross Deligatur" og serligur ráðgevi fyri Reyða Kross Føroya, sigur Reyði Krossur Føroya. Lýsingin av uppgávuni kann lesast á heimasíðuni www.redcross.fo.

# Vaksin sum st-st-stan

**Meðan børn sum stama ofta verða loftað longu í dagstovninum, eru nógv vaksin illa tarnað av stamingini. Men tey kunnu fáa hjálp á Sernámsdeplinum**

NÁMSFRØÐI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hann hevur lært seg at liva við ongari telefon.

Eisini hevur hann lært seg onki at siga við fremmandafólk.

Tí er hann nógv heima. Sum oftast einsamallur.

Nógv fólk sum stama eru somikið ávirkað av talibrekinum, at tað forðar teimum at liva tað lívið, sum tey kundu hugsað sær.

Niðurlendingurin Jan Tinge er serfrøðingur í staming. Hann hevur ein Ph D. innan talupedagogikk og starvast á vitanardeplinum CHK, Center for Hjælpemidler og Kommunikation í Suðurjýtlandi í Danmark.

Seinastu dagarnar hevur hann hildið skeið fyri starvsfólkum á Sernámsdeplinum, har føroyingar við talutrupulleikum verða vístir til.

### Altíð stamari

Jan Tinge hevur ta grundhugsjón, at ein stamari altíð verður stamari. Men hann kann læra at minka somikið um stamingina, at hon næstan ikki hoyrist.

Hann greiðir frá, at tað finnast tveir høvuðsrætningar innan stami-viðgerð. Sjálvur hoyrir hann til tann vongin, sum fer inn og arbeiðir miðvíst við at minka um stamingina hjá fólki. Hin hátturin er hann, sum nógvir føroyingar hava roynt til dømis í Noregi. Har hava tey eftir fáum vikum lært nakrar teknikkir, sum gera, at tey aftur fáa tosað.

- Har fáa fólk eitt nýtt og eftirgjørt mál, sum hvørki er flótandi ella teirra egna. Og tað haldi eg vera ein



*- Tað kann tykjast rættiliga komiskt hjá einum stamara, sum brádliga skal "stama ígjøgnum". Tí fer viðgerðin eisini fram í bólki saman við øðrum stamarum*